Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
Ítróttur: Jákup Mørk
Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin

Bústaður: Argjavegur 26, Argir
Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820 **Fax.** 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: P/F Prentmiðstøðin

Fyritøkur hjá Føroya fólki skulu seljast

Oddagrein

EFTIR ætlan landsstýrisins skulu almennu fyritøkurnar nú seljast. Í ólavsøkurøðu løgmans verður sagt, at »landsstýrið hevur í hyggju at seta eina nevnd at virðismeta stovnar og partafeløg, sum landið eigur. Nevndin skal gera uppskot um, hvørjar av hesum ognum landið hóskandi eigur at selja, nær tað eigur at verða gjørt og í hvørji raðfylgju«. Einki verður sagt um, hvørjar stovnar ella hvørji partafeløg, landsstýrið hevur í hyggju at selja. Men tey stóru partafeløgini eru Føroya Banki, Føroya Fiskavirking, Føroya Fiskasøla, Føroya Tele og Faroe Airways.

HESI nevndu feløg – uttan Føroya Tele – komu øll í trupulleikar í kreppuni, og tað var neyðugt hjá landskassanum at seta pening í. Talan var um nógvan pening – útvið tríggjar milliardir krónur tilsamans, sum føroysku skattgjaldarnir máttu gjalda og knógva undir. Føroyski skattgjaldarin – ella Føroya fólk – eigur tí hesi feløg í dag.

FELØGINI verða øll rikin á vanligum búskaparligum grundarlagi, eftir vanligum marknaðartreytum, og tí skuldi verið líka mikið, hvat navn stendur á partabrøvunum, Hanus ella Janus, ella Føroya Landsstýri. Feløgini ganga væl. Leiðslurnar eru góðar og líkt er til, at landsstýrið og Fíggingargrunnurin hava verið heppin í nevndarvali. Kanska hepnari enn um talan var um ein vanligan aðalfund, har eitt nevndarval sum oftast var avgjørt frammanundan. Hugsið bara um aðalfundirnar – glantrileikirnar – í gamla Føroya Banka og Sjóvinnubankanum!!!

HVÍ er tí so umráðandi at selja hesi feløg longu nú? Ein orsøk er sjálvandi hon, at í einum liberalistiskum samfelag er natúrligt, at hesi feløg eru privat ogn. Men í einum slíkum samfelag er heldur ikki vanligt, at feløg vera loftað í so stóran mun, sum gjørt varð í Føroyum í nítiárunum. Men vórðu hesi feløg ikki loftað, so hevði kreppan óivað verðið nógv verri. Ein onnur orsøk er, at summar borgarligar kreftir tola ikki, at tað almenna – felagsskapurin hjá okkum øllum – eigur ognir, ella virki, serliga um tey ganga væl. Ein triðja orsøk er, at altjóða rákið er at privatisera alt sum er alment. Ein fjórða orsøk – og tað er helst orsøkin hjá landsstýrinum við tí vinstrahalla Tjóðveldisflokkinum – er at útvega landskassanum pening til fullveldisætlanina – ella skiftistíðargrunnin.

MEN neyvan fer føroyski skattgjaldarin, sum legði rygg til at bjarga føroyska samfelagnum, at góðtaka, at hesar almennu fyritøkur verða seldar nøkrum fáum. Kanska einstaklingum ella fyritøkum, sum fingu sanering í kreppuárunum! Skulu tær seljast, eigur føroyski skattgjaldarin – sum enn ikki er komin úr kreppuni og fingið ráð til umvælingar, ábøtur, endurnýggingar o.a. – at hava sín natúrliga rætt til at gerast ánari í hesum fyritøkum.

Sosialurin

Vit hava ongan trupulleika

Fíggjarnevndin hevur ikki handlað øðrvísi enn í øðrum líknandi málum, so Tjóðveldisflokkurin skal ikki skjóta eftir okkum, sigur Bjarni Djurholm

JÁKUP MØRK

Síðani kanningin í málinum um Signar á Brúnni var liðug, eru atfinningar sendar í ymsar ættir. Stýrisskipanarlógin eins og aðrar hava fingið síni orð, eins og fíggjarnevndin eisini er átalað fyri at teir ikki vildu ganga ynskinum frá landsstýrismanninum á møti.

Greiðan málsetning

Bjarni Djurholm, formaður í fíggjarnevndini, er tó fullkomuliga ósamdur við teimum, sum meta, at fíggjarnevndin hevur fingið ein trupulleika við hesum málinum.

Hann vísir á, at nevndin hevur ein púra greiðan málsetning, har teir skulu ansa eftir almennu útreiðslunum í samfelagnum, og vísir hann í hesum sambandi til grein 43 og 44 í stýrisskipanarlógini. Hetta eru greinarnar, har staðfest verður, at eingin útreiðsla skal ávísast, uttan at neyðug játtan fyriliggur, tó so at í serligum førum kann peningur verða givin.

Formaðurin í nevndini sigur, at teir alla tíðina hava verið sera restriktivir, ella varnir, í sínum málsviðgerðum: - Tær ferðirnar, vit hava nýtt undantøkini í stýrisskipannarlógini, hava verið, tá vit hava vita, at løgtingið hevur eina tilsøgn í málinum, ella tá talan hevur verið um útreiðsluneutralar flytingar millum konti.

Sostatt er Bjarni Djurholm eisini ósamdur við Peturi Petersen, sum í blaðnum í gjár førdi fram, at talan var ikki um nakra útreiðslujáttan til SvF, men harafturímóti um at veita stovninum gjaldføri. At fíggjarnevndin metir, at talan er um eina eykajáttan, framgongur eisini í álitinum, sum ein samd fíggjarnevnd hevur skrivað, har teir eisini mæla til, at løgtingið samtykkir eitt komandi uppskot um eykajáttan til SvF.

Ikki akutt støða

At talan skuldi vera um nakra akutta støðu í hesum málinum, er fíggjarnevndarformaðurin heldur ikki samdur í:

- Longu í oktober mánaði í 1998 var landsstýrismaðurin greiður um, at talan var um fíggjarligar trupulleikar hjá SvF. Hetta var áðrenn álitið til fíggjarlóg fyri 1999 varð skrivað, so hann hevði allar møguleikar at gera vart við trupulleikan. Harumframt fekk hann í mars boð um, at støðan var um at gerast akutt, og í apríl komu skrivlig boð um hetta, sigur Bjarnir Djurholm. Hann leggur afturat, at tað tað at eitt mál gerst akutt, orsakað av at landsstýrismaðurin hevur bølt á tí, ikki kann lastast fíggjarnevndini.

-Heldur ikki kann tað lastast okkum, at Signar eftir hetta handlaði, so sum hann gjørdi. Vit høvdu ráðført okkum við okkara løgrøðiliga ráðgeva, so hjá okkum var einki ivamál, sigur fíggjarnevndarformaðurin víðari.

Tað er tjóðveldisflokkurin og ikki fíggjarnevndin, sum hevur fingið ein trupulleika i málinum um Signar á Brúnni, sigur Bjarni Djurholm

Tjóðveldistrupulleiki

At enda sigur Bjarni Djurholm, at tað eftir hansara tykki er stórt spell, at tjóðveldisflokkurin á henda hátt roynir at skumpa ein internan trupulleika á onnur.

- At teir soleiðis royna at skáka sær undan ábyrgd, kann hava skaðandi árin á stýrisskipanina, eins og hetta eisini er við til at undirgrava álitið á politisku skipanina, sigur Bjarni Djurholm at enda.

Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæri bróðir og svágur

RAGNAR ØRVARODD
á Sandi

doyði og varð jarðaður. Ein serstøk tøkk til tykkum á B8, ið vóru so góð við hann og passaðu hann so væl til tað seinasta. Tøkk til prestin í kapellinum og sandoyarprestin fyri troystarrík orð. Takk til dekn, klokkara, organistar, sangarar, berarar og til tykkum, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað. Ein tøkk til tykkum, ið hjálptu til á ymiskan hátt. Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Hjartafelagið.

Fyri tey avvarðandi

Jana, Mikk, Snæbjørg og Adelheit

Alt skal ver›a klárt

Herálvur Joensen, a›alstjóri í Oljumálast‡rinum, ivast ikki í, at nøkur oljufeløg sleppa at bora einafer› eftir ólavsøku í komandi ári

A›alstjórin í Oljumálast‡rinum er sannførdur um, at mannagongdir fyri bæ›i umhvørvi og tilbúgving koma í rættlag, so oljufeløgini sleppa at bora í seinnu helvt av komandi ári

DIA MIDJORD

Oljufeløgini sleppa at bora einafer› eftir ólavsøku ár 2001. Hetta lovar Herálvur Joensen, a›alstjóri í Oljumálast‡rinum, hóast langt frá alt er komi› í rættlag.

– Ta› ver›ur strævi› at gera alt klárt, men vit skulu klára at taka ímóti umsóknum um eina borigó›kenning einafer› komandi vár, sigur a›alstjórin.

– Í hvussu so er nøkur oljufeløg skulu sleppa at bora í komandi ári, sigur hann.

Herálvur Joensen sigur ví›ari, at tvær kunnger›ir eru longu li›ugt skriva›ar, og mi›ja› ver›ur ímóti, at f‡ra aftrat koma í gildi á n‡ggjárinum.

– Sostatt vita oljufeløgini eftir n‡ggjár, hvussu tey skulu fyrihalda seg, tá umsóknin um borigó›kenning skal skrivast, sigur a›alstjórin.

Á gó›ari lei›

Eitt er at Oljufyrisitingin ver›ur li›ug vi› sín part, men hvussu langt eru a›rir føroyskir myndugleikar komnir.

– Vit hava havt onkrar fundir vi› a›rar myndugleikar og koma einafer› í heyst at taka hetta mál uppaftur. Hóast eg ikki kann siga, hvussu ø›rum myndugleikum gongst, so vænti eg, at alt ver›ur li›ugt til tí›ina, sigur Herálvur Joensen, a›alstjóri í Oljumálast‡rinum.

Hann leggur aftrat, at tá leitingarloyvini ver›a givin í næstum, so er ta› út frá tí fyritreyt, at alt anna› skal ver›a klárt í 2001, so oljufeløgini kunnu søkja um borigó›kenning.

– Men vit rokna ikki vi›, at allir loyvishavararnir fara at bora beinanvegin. Vit skulu nokk vera so klár, at nøkur oljufeløg sleppa at bora beinanvegin, sigur a›alstjórin.

Hann leggur aftrat, at oljufeløgini hava eitt leitiskei› á seks ár.

– Og oljufeløgini mugu ikki missa eitt av hesum árum, tí at føroyskir myndugleikar ikki eru klárir. Vit hava hóast alt arbeitt fram ímóti hesum í mong ár.

Tveir prestar fáa arbei›i í næstum

Hesir vaksa ikki á trøunum

Enn er eingin prestur settur í starv í Vági, og um stutta tí› ver›ur eitt starv leyst á Vi›arei›i

DIA MIDJORD

Kirkjurá›ini í Su›uroyar sunnara prestagjaldi hava enn ikki tiki› stø›u til, um einsamalli umsøkjarin í Vági skal fáa prestastarvi›, sum Elsa Funding hevur røkt seinastu árini. Møguliga ver›ur starvi› l‡st leyst einafer› aftrat.

Á Vi›arei›i ver›ur eisini eitt starv sum sóknarprestur leyst í næstum. Verandi sóknarprestur Meinhard Bjartalí› skal innsetast sum sóknarprestur á Glyvrum.

Tørvur á prestum

Virkandi bispur, Bjarni Bæk, vil ikki beinlei›is siga, at stórur tørvur er á prestum, men hann sigur, at prestar hanga ikki á trø›unum.

– Einir fimm føroyingur eru í holt vi› at lesa til prest, men teir ver›a ikki lidnir fyrr enn um nøkur ár.

Petur Martin Rasmussen, Niels Pauli Danielsen, Hans J. Joensen og Bjarni Bæk eru allir komnir naka› upp í árini. Teir kunnu virka í starvinum til teir eru sjeyti ár, so um nøkur ár fella teir fyri aldursmarkinum.

– Men tá eru uttan iva fleiri n‡ggjar kreftir klárar at taka vi›, sigur virkandi bispur, Bjarni Bæk, i› er dómpróstur í Havn.